Nr. 7 | nov. 2013 | 66. árið

# Kirkjuligt Missiónsblað

## Og eg sá nýggjan himmal og nýggja jørð, tí at hin fyrri himmalin og hin fyrra jørðin vóru horvin.



*Og eg sá nýggjan himmal og nýggja jørð, tí at hin fyrri himmalin og hin fyrra jørðin vóru horvin.*
*Jóhs. Op. 21, 1.*

Mong gerast vónbrotin, tí tey hava alt ov stórar vónir til lívið her á jørð. Ofta halda tey, at lívið hjá einum trúgvandi kann samanberast við at koyra á einum breiðum, jøvnum og beinum vegi. Men Bíblian lærir nakað annað.

Vegurin til himmals er smalur. Hann gongur gjøgnum ein heim, har Sátan er høvdingur. Hann hevur ikki til endamáls at gera tað lætt fyri tey kristnu. Tí sigur Jesus: "Í heiminum hava tit trongd."[1]

Í tíðini beint undan Jesu afturkomu stríðist Sátan av øllum alvi. Hansara vreiði er stór, tí hann veit, at hann hevur stutta tíð. Mong hava verið og eru forfylgd runt um í heiminum. Ja, á ein ella annan hátt kenna kristin, at tey eru ikki av hesum heimi.

Harumframt kemur tann mótgongd, sum Guðs børn hava til felags við øll onnur. Sjúka, vanlukka, neyð hjá okkara nærmastu og okkum sjálvum kastar myrkar skuggar inn yvir lív okkara.

Heimurin hevur ikki tann frið, vit søkja, tí leingjast vit eftir staðnum, har Guð er.

Guðs orð vissar okkum um, at vit ikki fara at verða vónbrotin. Hevur tú hugsað um, at longsulin eftir himli veksur, tá Guð leiðir okkum í gjøgnum okkurt trupult? Tað er samanhangur millum kensluna av ótryggleika og vónina um staðin við teimum føstu grundvøllunum.

Guð skapar nýggjan himmal og nýggja jørð, har rættvísi býr. Hoyrir tú Jesusi til, ert tú himmalborgari. Tú skalt í ævinleikanum vera í landinum, har sólin aldri setur. Tá er eingin synd longur ei heldur fylgjurnar av henni.

Fyrst av øllum verður tín andligi hungur mettaður og tín tosti sløktur. Tú skalt síggja Jesus, sum hann er. Sjónin av honum skal umskapa teg. Tú skalt líkjast honum.

Øll hjørtu skulu æra og tæna Harranum í allar ævir.

Latið okkum gleða okkum til Jesu afturkomu. Hann hevur ikki gloymt okkum. Skjótt kemur hann og ger allar lutir nýggjar.

[1] Jóhs. 16, 33.

Hans Erik Nissen
Týtt: Marna Ellingsgaard.

## "Biðið fyri arbeiðinum!"



# Bræv nr. 10

## 20-10 2013

Vit hava nú verið heima í nakrar mánaðir og um minni enn tvær vikur fara vit aftur til landið, har vit arbeiða. Vit komu heim, tí okkara triðja barn var á veg, og í septembur fingu vit ein son. Bæði mamma og sonur hava tað gott, og vit eru sera takksom fyri at alt gekk væl.

Tíðin heima hevur verið sera góð hjá okkum. Døtrarnar hava gingið í ávíkavist skúla og barnagarð og tað hava tær verið glaðar fyri. Eisini fyri okkum hevur hetta verið ein tíð, har vit hava kunnað lagt tær stúringarnar til viks, sum fylgja við, tá ið ein arbeiðir við at boða gleðiboðskapin um Jesus í einum landi, har trúboðarar ikki eru vælkomnir.

Vit hava fleiri ferðir hugsa um hetta, meðan vit hava verið heima. Hvat kostar tað at vera kristin her á landi í mun til at vera kristin í landinum, har vit arbeiða? Vit hava vinir, ið hava mist alt samband við familju og vinir, tí tey hava tikið við trúgv á Jesus. Fólk hava mist arbeiðið og fíggjarligar fyrimunir, tí tey ynskja at fylgja Jesusi eftir.

Hvussu er tað við okkum? Vit kunnu læra nógv av okkara kristnu brøðrum og systrum, sum búgva í londum, har tey kristnu gjalda ein høgan prís fyri teirra trúgv. Líka sum tey, mugu vit leggja mannaótta til viks og lýta á Gud. Vit stúra kanska fyri, at onnur flenna eftir okkum, um vit vitna um Jesus – kanska er tað flovisligt fyri okkum, um vit siga, vit eru kristin. Men her mugu vit læra av teimum, sum gjalda ein nógv hægri prís. Skulu vit so ikki eisini royna at leggja menniskjaóttan til viks, so vit kunnu vera ljós og salt fyri okkara næsta?

Um minni enn tvær vikur fara vit so aftur til landið, har vit arbeiða. Vit gleða okkum nógv at koma aftur og at síggja vinir okkara har. Beint áðrenn vit komu heim, fluttu vit í eina aðra íbúð. Vit fluttu, tí tað kann gerast sera kalt í býnum har vit búgva, og okkara gamla íbúð var ikki væl isolerað. So vit eru flutt frá 7. hædd til 1. hædd. Vit búgva framvegis í sama øki, men eru nú væl nærri skúlanum hjá okkara elstu dóttir. Øll okkara ting eru framvegis í flytikassum í nýggju íbúðini, so tað verður eitt sindur sum ein nýggj byrjan at koma aftur til landið. Men vit eru sera spent og vænta, at vit koma at trívast væl í nýggju íbúðini.

Ætlanin er, at halda á við at lesa staðbundna málið á universitetinum, samstundis sum vit arbeiða uppá at planta eina luthersku kirkju í býnum, har vit virka. So vit hava meir enn nokk at gera – ja, arbeiðið í Guds ríki verður ikki liðugt fyrr enn Jesus kemur aftur.

Takk fyri forbøn!

J og S

# Ein vitnisburður úr Japan.

Úr vindeyganum síggi eg børnini á einum buddhistatempli hinumegin vegin. *Hioka* stendur á einari talvu við inngongdina. Tað merkir nakað tað sama sum sólarljós. Men tað er alt annað, enn andaligt sólarljós. Inni í parkini standa nógvar skurðgudamyndir á rað og frammanfyri hvørja stendur eitt vakurt blómutyssi.

Stutt sagt, tey, sum tilbiðja hesar myndir, liva í myrkri. At ein heil tjóð, evnarík og upplýst, sum japanesarar eru, kann tilbiðja steinar og trø, er heilt óskiljandi. Men hetta er ein arvur frá fedrunum og tey eru bundin av hesari siðvenju.

Nú, næstan 40 ár eftir at eg kom higar til landið, hevur tað pínt meg, at vera vitni til at hetta fólkið livir uttan Guð og uttan vón.

Hetta er veruleikin í missións-arbeiðinum í Japan. Men vit hava nógv at gleðast um. Gleðiboðskapurin setur fólk í frælsi og mong eru tey, sum eru komin til trúgv og eru virkin í arbeiðinum at vinna menniskju fyri himmalin.

Okamura er ein góð fyrimynd. Hennara vitnisburður um umvending og tað nýggja lívið, er so talandi, at tað átti at eggja sendimeinigheitini at verða enn meira áhaldandi í tænastuni.

Okamura býr í einari lítlari íbúð. Stova hennara vitnar um, at her býr ein sermerkt kristin kvinna. Á borðinum liggur ein sálmabók og ein stór opin bíblia. Hon roynir at læra seg bíbliuørindi uttanat, meðan hon arbeiðir.

Ein Kristusmynd, prýðir veggin aftanfyri hana og vitnar um hvør býr her. Tað fyrsta eg legði til merkis, tá eg kom innar, var tann hjartaliga móttøkan. Hon beyð mær sess í hugnaligu stovuni.

Við kenslubornari rødd sigur hon frá: “Tá ið maður mín doyði í 1954, hevði eg ongan livandi Guð at venda mær til við míni neyð. Eg átti fýra børn, tað yngsta var bert 6 ára gamalt. Jesus kendi eg ikki og øll í míni ætt vóru buddhistar. Okkurt mátti eg hava at stiðja meg til, so eg fór í ta víðgongdu sektina Sokagakkai. Eg bað og eg rópti til gudarnar, bæði tíðliga og seint, men eg fekk ongantíð nakað svar. Eg ofraði pening og strevaði og stríddist í angist og ófriði, men onki hjálpti. Hevði onkur sagt mær um Jesus tá, kundi eg havt fingið frið og frelsu og so kundi eg víst børnum mínum meira av hansara kærleika, tá tey vuksu upp. Nú er alt bara myrkur og vónloysi.”

Hon turkar tár úr eygunum. Men so lýsnaði andlitsbragdið og hon helt áfram: "Nøkur ár seinni, kom ein trúboðari higar og byrjaði at hava møtir her í grannalagnum. Dóttir mín varð skjótt íðin søkjandi. Í brævi og samrøðu, vitnaði hon fyri mær og bað meg koma við á møti. "Eg vil so fegin, at tú skalt venda um mamma og at tú skalt trúgva á Jesus, sum doyði fyri syndir okkara á krossinum. Ynski mítt er, at tú skalt koma í Himmalin, tú sum hevur stríðst so nógv fyri meg." Eg hugsaði við mær, meinar hon við Reyða kross? Eg kendi hendan hjálpar felagsskapin við tí reyða krossinum sum eyðkenni.

Samkomuleiðarin bað meg eisini koma við á møti, men eg var stolt og treisk og svaraði: "Kann eg trúgva á ein Guð, sum eg ikki kann síggja?" Tað endaði við, at eg fór á møti, men eg skilti onki at tí sum sagt var. Kortini helt eg áfram at koma. Ein dagin hoyrdi eg eina talu, har lisið var úr Jákups brævi 1. 23-24. "Tí at um einhvør hoyrir orðið og ikki ger eftir tí, tá er hann líkur manni, sum skoðar sín natúrliga andlitsskap í spegli; tá at hann skoðar seg sjálvan og fer avstað og gloymir við tað sama hvussu hann sá út."

Eg sá meg sjálvan í hesum spegli og kundi ikki gloyma hvussu eg sá út. Eg sá, at eg var ein syndari, sum livdi í avgudadyrkan. Tað var svárt at verða dømd í samvitskuni. Eg skilti nú at húsgudarnir ikki kundu hjálpa mær, men tað kundi Jesus. Hann sum doyði fyri mínar syndir á krossinum. Ein dagin var eg innløgd á sjúkrahúsið. Meðan eg lá har, las eg nógv í bíbliuni, sum eg hevði fingið."

Hon hugdi álvarsom at mær og helt áfram: " Nú sá eg meg sjálvan í Guðs ljósið. Eg elskaði ikki Guð og heldur ikki mín næsta. Í míni avgudadyrkan, hevði eg ongantíð lært at takka, men bara til gudarnar um tað sum hoyrir hesum heimi til. "

Hon skalv á málinum og tárini runnu. "Tonk, ein slíkan syndara elskaði Jesus so nógv, at Hann gav sítt lív fyri meg. Nú skilti eg orðið um krossin og at Jesu blóð reinar frá allari synd. Eg bleiv so glað og takksom, at eg mátti lovsyngja honum har á sjúkrastovuni.

Tá eg kom heim, savnaði eg allar avgudarnar saman, sum eg hevði tilbiðið og brendi teir. Eg var frí og fødd av nýggjum, við trúnni á Jesus!" Andlit hennar lýsti. "Hygg," segði hon, her havi eg alla bíbliuna, sum eg trúliga lesi, ein sannur dýrgripur. Eg byrji við 1. Mósebók, og royni at lesa hana í gjøgnum eftir einum ári. Eg brúki nógva tíð í bøn. Um morgunin biði eg um rættleiðing og hjálp, biðið fyri mínum egnu, fyri grannunum og teimum eg kenni. Seinni um dagin, takki eg Harranum fyri hansar vælsignilsi og tá eg leggi meg um kvøldið, syngi eg Guði lov og sigið: "Kæri Guð takk fyri tína umsorgan og takk fyri, at eg kann leggja meg at sova." Tá sovni eg trygt.

Men tað hendir, at Sátan plágar meg í dreymi og minnir meg á gamlar syndir. Tá vakni eg og biðið Jesus reinsa meg í sínum blóði – tá má Sátan flýggja. Tískil

er Jesus mín troyst og hjálp í øllum lutum, bæði á nátt og degi. Spurningurin hjá mær er: Hvat skal eg gera fyri ein so stóran frelsara? Eg havi biðið hann vísa mær tað. “

Hon stríddist við at reisa seg upp úr stólinum. Frammanundan hevði hon fingið eina skurðviðgerð í mjødnini og var tí sløðrut á beininum. Hon fór út í køkin og kom aftur við einum nýbakaðum breyði í einum plastposa. “ Hetta er til tygum. “ segði hon smílandi, tit hava so nógv at gera í missiónsarbeiðinum, so eg vil fegin hjálpa tykkum eitt sindur. Versonur mín, sum bleiv kristin fyri 4-5 árum síðani, gav mær eina maskinu, at elta breyð við. Eg keypi bíliga mjólk og fari tíðliga upp um morgunin at baka, ikki til mín sjálvs, tí eg eti ikki breyð, men til vinir og kenningar.

Eg vil so fegin vísa øðrum, nakað av Jesu kærleika; tí taki eg breyð við mær, tá eg eri úti á vitjan. Tá fái eg lættari samband við fólk og kann vitna fyri teimum um Jesus, sum er Lívsins breyð. Eg má biðja tey kristnu, sum eru vorðin líkasæl, andaliga sæð, um at koma í kirkju og har møta Jesusi í orðinum. Eg eri góð við tey øll. “

Í 12 ár hevur hendan kvinnan syrgt fyri matgerðini í samband við ymisk tiltøk í kirkjuni. Ofta møtir hon upp klokkan fimm um morgunin at fyrireika alt. Hvørt einstakt menniskja liggur henni á hjarta og hon brúkar telefonina nógv. “ Hygg her, “ sigur hon, “ her havi eg nøvnini á øllum, sum eg kann ringja til.

# “Biðið fyri arbeiðinum!”



Eg ringdi til eina gentu, sum var happað í skúlanum. Eg uggaði hana og bað hana og mammu hennar koma í kirkju. “ Og tær komu”, sigur hon glað.

“Eg síggi at tú hevur nakrar japanskar dukkur liggjandi her, “ sigi eg. “Ja, eg var mint á, at geva dukkur til basarin. Dukkusølan gjørdi tað, at vit fingu ein kross á kirkjutornið. Síðani eru dukkurnar sendar til missiónsarbeiði í Indonesia og Korea.

Í einum toki á veg til Tokyo, kom ein kona inn og setti seg hjá mær. Hon var næstan blind. Eg gav henni eina dukku og samstundis vísti eg henni á Guðs kærleika. Eg havi sent dukkur bæði til Noregs og Finnland í takksemi fyri at tey komu til okkara við gleðiboðskapinum.”

Størsta neyðin var, at tveir synir hennara ikki vóru frelstir. Ein dagin ringdi yngri sonurin og spurdi um hon ikki vildi koma heim til sín at búgva. “Nei,” svaraði hon, “eg komi ikki so leingi, sum tú ikki vendir um og trýrt á Jesus. Guð syrgir fyri mær her sum eg búgvi.” Hvussu kanst tú siga tað, tá tú ikki sært nakran Guð”, spurdi sonurin. “Eg síggi Guð í bíbliuni hvønn einasta dag og eisini í kristnu vinunum mínum sum hjálpa mær,” svaraði hon. Tað bleiv kvirt í hinum endanum á telefonlinjuni. “Hann er enn blindur og vantrúgvandi”, suffaði hon. Hetta var byrðan í hennara kristnilívi, ein byrða, sum noyddi hana at halda áfram í forbønartænastuni.

Neyðin fyri teimum ófrelstu í Japan, er byrðan hjá kristniboðarum og sendimeinigheitini, ein byrða, sum Harrin ikki kann taka frá okkum. Tað átti at elvt okkum til áhaldandi forbøn og tænastu, soleiðis sum Okamura minnir okkum á. Vit mega vinna japanska fólkið við gleðiboðskapinum, áðrenn Jesus kemur aftur. Tá ið eg skuldi fara, sigur hon: “ Tú mást heilsa missiónsvinunum í Noregi og takka fyri at tey sendu evangeliið til mín. Nú eri eg til reiðar at fara herfrá, hvønn dag tað skal vera. “

Per Finnseth
Lea Juul týddi

# Efesus 1,1-3

Paulus, ápostul Krists Jesu við Guðs vilja, til teirra heilagu, sum eru í Efesus, og sum eru trúgvandi í Kristi Jesusi.

Náði veri við tykkum og friður frá Guði, faðir várum, og Harranum Jesusi Kristi!

Lovaður veri Guð og faðir várs Harra Jesu Krists, sum hevur vælsignað okkum við allari andligari signing á himnagrundum í Kristi,

Vanliga, tá ið eg havi fingið eitt bræv, so er tað fyrsta, sum eg hyggi at, tað er avsendarin. Og tá ið eg havi fingið fleiri, er avsendarin oftani avgerandi fyri í hvørji rekkjfylgju eg lesi brøvini.

Vit hava fingið eitt bræv. Vit hava lisið tann fyrsta partin av tí. Hetta brævið er frá Paulusi. Og tá ið hann skrivar til okkara her, so er tað ikki bara sum privatpersónur, hann skrivar, men hann skrivar sum ápostul Krists Jesu. Tað vil siga, at vit hava fingið eitt bræv frá Jesu Kristi sendiboði. Ápostul merkir nevniliga sendiboð. Og tað vil siga, at tað, sum hann skrivar í hesum brævi til okkara, skrivar hann sum sendiboð hjá honum, sum er hin salvaði frelsarin. Tað er tað, sum Jesus Kristus merkir. Tað vil siga, at tað, sum Paulus skrivar til okkum, tað eru orð frá Harranum Jesusi sjálvum. Tí Paulus er ápostul Krists Jesu. Og so sigur hann eisini: "Við Guðs vilja!"

Tað vil altso siga, at Paulus er ápostul Krists Jesu við Guðs vilja. Í Ápostlasøguni lesa vit, hvat Jesus sjálvur sigur um Paulus. Í Ápostlasøguni 9 sigur Jesus við Ánanias um Paulus í vers 15-16, at: *(...) hesin maður er mær eitt útvalt ílat til at bera navn mítt fram fyri heidningar og kongar og Ísraels børn; tí at eg vil sýna honum, hvussu mikið hann eigur at líða fyri navns míns sakir.*

Men hvønn er so hetta brævið til? Tað stendur til teirra heilagu, sum eru í Efesus og sum eru trúgvandi í Kristi Jesusi. Efesus var ein stórur býður við stórum handilsligum og mentanarligum týdningi.

Man er ikki heilt vísur í, um brævið upprunaliga hevur verið til til meinigheitina í Efesus. Vit síggja í fótnotuni, at "í Efesus" ikki hevur staðið í summum av teimum elstu handritunum. Og tað eru ting í brævinum, sum eisini peika tann vegin, sum t.d. at meinigheitin og Paulus bara kenna hvønn annan av umtalu. Tey hava hoyrt um hvønn annan. Tí heldur man ikki at tað kann vera meinigheitin í Efesus, hvar Paulus var í heili trý ár.

Tað, sum vit skulu leggja til merkis, er, at Paulus skrivar til tey heilagu. Og hvørji eru tað, sum eru tey heilagu? Jú tað eru tey, sum eru trúgvandi í Kristi Jesusi. Teimum heilagu heilsar Paulus soleiðis: Náði verið við tykkum og friður frá Guði, faðir várum, og Harranum Jesusi Kristi!

Orðið náði, skal ikki bert skiljast sum nakað

yvirberandi og útssaligt nakað. Tí í bíbliuni hevur orðið náði merkingina; yndi. Vit lesa t.d. um, tá ið Jósef var hjá Potifar, at Jósef fann náði í eygum Potifars. Og tá ið vit í Jólaevangeliðinum lesa; í menniskjum góður tokki, so hevur tað sama týdning, sum orðið náði. Náði merkir altso Yndi og góður tokki. Hvat er tað, sum ger, at tú kanst hava yndi og góðan tokka og frið frá Guði og Harranum Jesusi Kristi?

Jú tað er tað, at tá ið tú ert trúgvandi í Kristi Jesusi, so ert tú heilagur, tú ert reinur, tú ert lýtaleysur fyri ásjón hansara.

Og tá ið Paulus her sigur Náði veri við tykkum og friður frá Guði, faðir várum og Harranum Jesusi Kristi! So er tað ikki eitt ynski. Nei, tað er hann slett ikki í iva um, at náði og friður frá Guði er við teimum. Og eingin trúgvandi eigur at vera í iva um tað.

Tí at tá ið tú við trúnni ert halgaður Kristusi, so er Guðs Náði og Friður eisini við tær altíð. Men tað, sum vit hava her fyri okkum, er ein signing. Tað vil siga, at hann her prísar teimum fyri tað, sum fylgir teimum. Náði veri við tykkum og friður frá Guði og harranum Jesusi Kristi.

Og hesa náði og hendan frið hava vit ikki fyri okkara gerninga skuld. Men vegna okkara trúgv. Tann trúgvin, sum halgar okkum Kristusi. Tann trúgvin, sum ger okkum til ogn Kristusar. Orðið Friður, eitur á hebraiskum shalom og tað merkir nakað, sum er heilt. Tað vil siga, at Guð sær sítt forhold til okkara sum Heilt. Sum nakað, sum ikki manglar nakað. Og tað kemur heldur ikki av okkara levnaði, at vit ikki mangla nakað. Men tað kemur av einum heilt ávísum. Trúnni, hvar í eg eri halgaður Kristusi. Og hesa signing kann tað vera neyðugt at lýsa yvir eina meinigheit. Tí at tað er avgjørt ikki, hvat ein kristin upplivir og sær við sær sjálvum. Hann følir ikki, at tað ikki er nakað, sum manglar. Tvørtur ímóti. Hann kennir so ótalligar manglar við sær sjálvum. Og tað kann hann blíva upptikin av. Hann kann blíva upptikin av, at hann er ein vánaligur kristin. Tí at hann kann ikki trúgva, og hann kann ikki føla og hann kann ikki uppliva. Hann kann einki. Og í øllum hesum ger hann ikki nakað annað enn, at hann heldur seg til tað vón: Harri, tú doyði fyri meg! Tú hevur endurloyst meg við tínum blóði. Við øllum sínum manglum ger hann tað. Tað er tann trúgvin, sum ger, at hann hevur eitt heilt forhold til Guð. At tað einki manglar.

Tað er tað veruliga grund til at hoyra støðugt, tí at eg upplivi nakað heilt annað. Tað er júst tað, sum trúgvin má stríða við, við hjálp av Guðs orðið, um eg skal fata, at hettar er nakað veruligt.

Eg havi Guðs yndi. Tað átti eg at verið so fastur í, so at eg var heilt sannførdur, so at eg føli at eg havi tað. Og tað er tað, sum sigur mær, at eg havi brúk fyri at hoyra Guðs orð. Tí at tað er enn langt frá, at eg føli: eg havi yndi hjá Guði.

Og tí er tað eisini grund til at nevna, hvar tað kemur frá. Tað kemur frá tí at Guð hevur givið son sín og við honum gjørt okkum sátt við seg. At Guð sær alt heilt har sum trúgvin er, tað er ikki ein tala, sum kemur frá tómari luft. Men tað kemur frá einum verkið, sum er fullgjørt av Guði við syni sínum.

Tá ið vit hugsa um hetta, sum liggur í tí ápostólsku signingini, so er tað ikki undarligt, at ápostulin fer beinleiðis inn í at lovprísa Guði sum faðir várs Harra Jesu Krists.

Tað, sum hann prísar Guði fyri, tað er ikki lógina. Tí at yvir lógina kann eitt menniskja í sínum hjarta aldri prísa í sannleika. Eitt menniskja kann gleða seg yvir Guðs lóg og prísa tí í eina tíð. Tí at hvat hjarta vil ikki gjarna elska Guð? Hvat frómt hjarta vil ikki gjarna vera milt og gott og kerligt móti øllum menniskjum, soleiðis sum lógin krevur. Sjálvandi, tá ið eg lesi ta lógina, sum er heilag og góð, so kann eg vera gripin av gleði yvir so góð ting. Men – hvør vil prísa Guði, tá ið hann við tí ljósi aldri nær longri, enn til at blíva dømdur fyri sítt lív. Tá ið hann framhaldandi sær: hetta havi eg sitið og glett meg yvir, men eg havi aldri gjørt tað. Hetta havi eg biðið Guð um kraft til at fáa loyvi til at gera. Men allatíðina má eg siga: Ja, men, hví ert tú so soleiðis, sum tú ert?

Eg havi vilja tað góða ferð eftir ferð, men hvørja ferð, eg vil tað góða, so fáði eg gjørt tað ónda.

Hvør prísar nú Guði fyri Guðs lóg?
Skal eitt menniskjahjarta prísa Guði í heilagum anda, sum heilt er av sannleika, so kann eg bara prísa Guði fyri eitt. Fyri son hansara.

*Lovaður veri Guð og faðir várs Harra Jesu Krists.* Og her hava við veruliga grund til at prísa Guði. Og tað síggja vit í yvirflóð í versunum, sum síðani koma.

Dan Jógvan Eliassen

## 2. "Fátækur í mær sjálvum eg eri -."



Lógarinnar gerningar eru alt tað, eg geri fyri lógarinnar skuld, antin av ótta fyri hóttanum hennara, ella í áliti á hennara lyfti. Lógargerningar eru eisini tað, sum eg geri glaður og upplívgaður av nøgdseminum, eg kenni av mínum gudsótta og góðum gerningum.

Ávøksturin av trúnni er bara tað lívið, sum fylgir av, at eg havi fingið náði og sælu í Kristusi. So heilt fyri einki havi eg fingið tað, at eg ikki noyðist at leggja tveir pinnar á kross fyri mína frelsu. Eitt slíkt sælt frælsi kann veruliga upplíva og dríva eitt menniskja. Og alt tað ein ger í áliti á hesa náðina, tað er av trúgv.

Lógarinnar gerningar eru har ímóti altíð dálkaðir. Har afturat virkar lógin eisini á tann hátt, tá ið hon ræður í samvitskuni, at hon vekir óndskapin. Hon vekir girnd eftir tí ónda og ringan hug til tað góða. Tí er fyrsta treytin fyri halgan, tann innari heilagi hugurin, burtur. So verður heila menniskja meira ógudiligt og vanheilagt, enn nakrantíð.

Men mítt spilta hjarta vil enn siga: Tað ber ikki til bara at liva av náði. Eg má sjálvur gera okkurt fyri at gerast meira heilagur – meira heilagur enn náðin og trúgvin hava gjørt meg! Og tað eru altíð eisini nokk av teimum, sum vilja stuðla hesi talu og fáa meg burtur frá einfalt at vera í mínum krossfesta Kristusi og vænta alt gott frá honum. Tá ræður tað um at svara við Paulusi í Gal. 1: "Um so ein eingil frá himni boðar tykkum annan gleðiboðskap, tá veri hann bannaður!"

F. V. Krummacher talar í eini prædiku yvir Hásongin um hetta. Hann talar um kristin, sum í síni neyð hava fingið fyrigeving og frið í Jesu

blóði, og sum harvið eru blivin glað og lukkulig. "Nú ræður tað um," sigur hann, "at skilja tað ápostólska orðið: *Líkasum tit tí hava tikið ímót Kristi Jesusi, Harranum, soleiðis skulu tit liva í honum. (Kol.2,6)* Tá ið tey hava fingið fyrigeving, hugsa tey: tað gamla er nú farið, nú er alt nýtt. Vit mugu í øllum okkara verki og atburði vísa okkum sum veruliga endurfødd. So fara tey av øllum alvi at deyða tað gamla menniskja. Við at brúka allar tær kreftir, Guð hevði givið teimum, vóna tey, at tað fer at eydnast. Hjá teimum skal ikki finnast nakrar skroypiligur kristindómur, sum hjá so nógvum øðrum. Tey gjørdu eina ætlan og vónaðu, at tey, sum tíðin leið, kláraðu at leggja av ein synd fyri og aðra eftir. So máttu tey í øllum førum eftir tíggju, tjúgu árum kunna gerast Harrans dýrd til lov og prís.

At tey í fyrstuni máttu koma til Kristus sum heilt naknir brotsmenn, skiltu tey. Men at tey máttu halda á við at vera armir syndarar, høvdu tey ikki roknað við. Kundi tað vera meiningin, at tey, eftir sum tey vuksu í náðini, tess meira máttu merkja vesaldómin í sínum holdi og soleiðis gerast støðugt fátækari og treingja til náði?

Enn siga tey seg ikki hava lært tað betur, enn at tey dagliga mugu læra tað av nýggjum. Men, siga tey: um einki hold skal rósa sær fyri Guði, um Kristusar sáttaroffur altíð skal vera verandi tann einasta grundin til okkara frelsu og trúgvin tann einasti vegurin til at náa hana, so má tað ikki ganga soleiðis, sum vit vónaðu og hugsaðu. Guð má tá til okkara eyðmýkjan lata okkum hava tað ónda, sum býr í okkum, og sum veruliga er okkara, hvussu illa vit enn vilja tað. *Fullkomiliga* beinir hann ikki burtur frá okkum nakað av tí ónda, sum er í okkum.

Til sína egnu dýrd heldur hann hjá sær tað góða, sum býr í honum og er hansara, hvussu gjarna vit so vildu havt tað hjá okkum. Hann gevur okkum ikki tann minsta neistan av ljósi og lívi á ein slíkan hátt, at vit kunnu síggja tað sum okkara egna. Tað stendur ikki til okkum sjálvs at fáa tað til vega, so at vit kunnu brúka tað, tá ið vit vilja. Tí kemur menniskjans sanna betran, sum er ein partur av grøðingini gjøgnum Jesu sár og ein ávøkstur av Harrans Anda, ikki at mangla! Tvørtur ímóti vil hon ikki fremjast so nógv av nøkrum, sum av, at ein altíð má vera og verða verandi ein syndari.

Krummacher hevur rætt. Eginkærleikin, menniskjahjartans sjúka, verður ikki yvirvunnin betri og grundigari enn á hesum eyðmýkingar vegi. Her lærir ein, hvat tað er at missa sítt lív. Ein lærir at geva Kristusi alla æruna. Alt gott hjá okkum, hvør sigur yvir freisting, hvør frelsa frá valdi syndarinnar, hvørt suff, sum stígur upp til Harran, hvør góður tanki, hvørt gott orð í rættari tíð – alt samalt verður nakað, sum verður okkum givið av náði. Hetta er ikki *okkara*. Sum alt annað Guð av síni náði gevur okkum, má tað frá stund til aðra verða givið okkum av berari náði.

Vit tala her um livandi kristin, sum við endurføðingini fingu lív og frið og gleði í Heilagum Anda. Harvið gjørdust tey veruliga heilt onnur menniskju, enn tey vóru áðrenn. Bæði tey sjálvi og onnur kundu klárt merkja ta broyting, sum var hend. Og tó má síðani sannanin av syndini støðugt haldast við líka og útdýpast. Tí førir Guð síni trúgvandi soleiðis, at tey ofta halda at tað er vorðið verri við teimum. Men tá ið tey hóast hetta halda seg til Kristus, fáa tey nýggjan hug og kraft (Jes. 40,31).

Júst hetta er vegurin til halgan. Á hendan hátt kúgast tað, sum er tað veruliga lívið hjá tí gamla menniskjanum, eginkærleikin. Á hendan hátt verður eisini kærleikin til frelsaran og tann lýdni andin støðugt endurnýggjaður.

Av Carl Olof Rosenius

Dan Jógvan Eliassen týddi

# Árskalendarin 2014

**Árskalendarin 2014 er nú klárur at selja og fólk eru byrjaði at ganga hús úr húsi at selja kalendarin.**

**Kalendarin kostar 80 krónur.**




**Nýggir haldarar**

Eg ynski at halda “Kirkjuligt Missiónsblað”.

Navn: ______________________

Bústaður: ______________________

Postnr. og bygd/býur: ______________________

Undirskrift: ______________________

*At senda til:*
Kirkjuligt Missiónsblað, Kongsgil 23 kj., FO-100 Tórshavn

# Grannar

Kjell og Knút høvdu í nógv ár verið bestu grannar og plagdu at hjálpa hvørjum øðrum. Ein dagin, tá ið Kjell hevði brúk fyri timbri, spurdi hann Knút, um hann kundi felt nøkur trø í hansara skógi, sum lá nærindis. Hesum játtaði Knút, og Kjell fór avstað.

Nakrar dagar seinni fór Knút ein túr gjøgnum skógin. Tá hann sá, at nøkur av trøunum vóru feld, angraði hann, at hann hevði lovað Kjell at fella tey og meldaði hann til løgregluna. Hann greiddi teimum frá, at Kjell hevði felt trø á hansara ogn uttan loyvi.

Seinni fekk Kjell boð um at møta í rættinum, ákærdur fyri stuldur. Í rættinum greiddi hann frá, at Knút hevði lovað honum at felt trøini, men Knút stóð við sítt og segði, at Kjell leyg. Kjell hevði eingi prógv ella vitni at vísa á, so hann varð dømdur fyri stuldur og skuldi gjalda eina stóra bót.

Komandi árið vórðu viðurskiftini millum grannarnar báðar heldur kaldligt, og teir høvdu lítið og einki við hvønn annan at gera. Sama árið manglaði Knút fóður til djórini á garðinum, tí at gróðurin hevði verið so vánaligur hjá honum. Grannin Kjell átti bø langt frá húsum, og har hevði gróðurin verið av tí allarbesta, so hann hevði ov mikið av fóðri. Knút hugsaði um, hvat hann skuldi gera og spurdi nakrar bøndur, um hann kundi keypa fóður frá teimum, men teir vóru næstan í somu støðu sum hann og máttu brúka fóðri til síni egnu djór.

Um djórini hjá Knút ikki skuldu doyggja, var bert eitt at gera, og tað var at fara til Kjell og spyrja, um hann kundi keypa fóður frá honum. Við ringum tannabiti fór Knút inn til grannan.

Kjell tók væl ímóti honum og lovaði honum at taka so nógv hoyggj, sum hann hevði brúk fyri. Tá ið Knút hevði fingið nóg mikið, spurdi hann Kjell, hvussu nógv hann skyldaði honum.

Nei, Kjell vildi onki hava afturfyri. Hoyggið skuldi hann fáa aftur fyri gerðina í rættinum fyri einum ári síðani. Tá varð Knút illa við, rætti Kjell hondina og bað um fyrigeving. Hann lovaði Kjell, at hereftir skuldi hann sleppa at fella so nógv trø skógini, sum hann hevði hug til.

Eftir hetta gjørdust Kjell og Knút bestu vinir aftur.

Leysliga umsett
Petra Gregersen

# BARNASÍÐAN

## Sálomon byggir templið

Tey fyrstu árini, Sálomon ráddi, var hann ein góður kongur fyri landið, og hann gjørdist eisini kendur víða um fyri vísdóm sín. Tá ið hann hevði rátt fyri borgum í fýra ár, fór hann undir at byggja eitt tempul. Hann brúkti tjaldtemplið sum fyrimynd. Tjaldtemplið var gjørt ísraelsfólki, meðan tey vóru í oyðimørkini. Tempul Sálomons var dupult so stórt sum tjaldtemplið.

Eins og tjaldtemplið var templið býtt upp í tvey, tað heilaga og tað allarheilagsta, og sáttmálaørkin var sett inn í tað allarheilagsta. Inn í tað allarheilagsta slapp bert høvuðspresturin einaferð um árið, og inn í tað heilaga, bert prestarnir. Rundan um tjaldtemplið var ein forgarður, men rundan um templið vóru tríggir. Ein forgarður fyri menn, ein fyri kvinnur og ein fyri heidningar. Menninir sluppu inn í allar tríggjar forgarðarnar, kvinnurnar í kvinnuforgarðin og heidningaforgarðin, men heidningarnir sluppu bert inn í heidningaforgarðin. Altarið í Tjaldtemplinum stóð í forgarðinum, meðan altarið í templinum stóð í forgarðinum hjá monnunum.

Tað tók sjey ár at byggja templið. Tá ið tað var liðugt, varð sáttmálaørkin borin inn í tað allarheilagsta. Sálomon kongur gekk fram fyri altarið, vígdi Guði templið og vælsignaði fólkið. Eisini bað hann fyri ísraelsfólki og teimum, sum ikki kendu Guð, at tey máttu koma at kenna hann. Í fjúrtan dagar hátíðarhelt ísraelsfólk, at tað hevði fingið tempul.

Petra Gregersen

Niðanfyri er eitt tempul. Litið tað.




Umbróting:
Brandur Petersen

Prent:
Estra

Ábyrgd:
Dan J. Eliassen

Útgevari:
Kirkjuliga Missiónsfelagið
Kongsgil 23 kj.
FO-100 Tórshavn
Tlf.: 282006
T-postur: kmf@kmf.fo
Heimasíða: www.kmf.fo
Konta: 9181-495.337.3

Kirkjuligt Missiónsblað
kemur út 8 ferðir um árið
( feb, mar, mai, jun,
aug, sep, nov, og des)

Haldaragjald: kr. 150,-